## Grein um Norrønu

Norska blaðið Bergens Tidende hevði í dag grein um siglingina hjá Norrønu. Í greinini varð greitt frá farleiðini hjá føroysku ferjuni, og hvørjir ferðamøguleikar eru knýttir at sjálvari ferðaætlanini, og harafturat varð gjørt burturúr, at Norrøna nú fer at sigla upp á Skotland. Bergens Tidende nam við, at Norrøna hevur onga kapping á rutunum í Norðuratlantahavi, men at skipið er í harðari kanning í siglingini millum Noreg og Danmark.




Føroyingar við íslendskum skipum:

# Meira fiskur - men verri sáttmála og lægri prís

FISKIVINNA
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*



*Bent tv. og Oddur sigla við línubáti í Íslandi. Teimum dáma væl. Har eru skipaði viðurskifti, og teir fiska nógv betri en líknandi bátar gera í Føroyum. Men í Føroyum er fiskimenn munandi betri tryggjaðir við sáttmála og fiskaprísum, og hetta er í hvussu er partvís takkað verið einum sterkum og væl virkandi fiskimannafelag*

Fyri tveimum vikum síðani hittu vit tveir føroyskar fiskimenn á Ørkini í Reykjavík. Teir eru Bent Kristian Thomassen av Viðareiði og Oddur Stefansson av Velbastað. Teir vóru júst komnir heim av túri. Teir sigla við einum línuskipi í Grindavík og vóru komnir inn at landa. Vit tosaðu um sáttmála og prísir og fingu møguleika fyri at sammeta umstøðurnar hjá fiskimonnum – og serliga línumonnum – í Íslandi við umstøðurnar í Føroyum.

Fyrst er lætt at staðfesta, at íslendsk skip fiska munandi størru nøgdir enn føroysku skipini. Orsøkin er teir stóru og ríku íslendsku fiskigrunnarnir.

Íslendska línuskipið hevur fiskað 225 t í januar. Verður hetta mett sum miðal fyri árið, svarar tað til 9,5 t um dagin. Og tá er ofta meira at fáa enn hetta. Miðalveiðan hjá føroyskum línuskipum var í 2006 3,6 t um dagin. Hetta merkir, at íslendska veiðan pr. dag er umleið ella meira enn 2,5 ferðir ta føroysku veiðuna.

Uppgerðin fyri januar er fyri 4 túrir. Landað verður eina ferð um vikuna, og støðgað verður heima eitt samdøgur fyri hvønn túrin. Tískil er talan um 24 fiskidagar.

Fyri hesar 24 dagarnar hevur samlaða inntøkan verið kr. 38.500, og tað gevur uml. kr. 1.600 pr. dag. Hetta er bert eitt vet meira enn daginntøkan við føroyskum línuskipum í 2006, sum var knappar kr. 1.500 um dagin.

Spurningurin er tískil, hvør orsøkin er til, at so nógv størri veiða gevur so lítlan mun í inntøkuni.

Tað eru tvær orsøkir. Annar er sáttmálin, og hin er fiskaprísurin, og skulu hesir munir lýsast nærri.

### Sáttmálin

Í Íslandi eru tveir satsir í sáttmálanum. Annar er prosentparturin, sum fiskimenn fáa til býtis. Hann er 32,3% av brutto. So er eisini nakað sum eitur »skiftisverð«, sum er ein óbeinleiðis oljufrádráttur. Hetta er tann parturin av hesum 32,3%, sum veruliga kemur til býtis. Skiftiverð valdast oljuprísin, men við høgum oljuprísium, sum teir galdandi, er »skiftiverð« 70%. Hetta merkir, at fiskimenn fáa til býtis 70% av 32,3%, og hetta gevur 22,6% + frítíðarløn 10,17%.

Tann føroyski sáttmálin gevur 43% við frádátti av olju, agni og provianti. Í miðal gevur hetta í 33-34% + 12% frítíðarløn sammett við tey 22,6% í Íslandi. Hetta merkir, at føroyski sáttmálin hjá fiskimonnum er **munandi** betri enn tann íslendski.

### Fiskaprísirnir

Tað, sum enn betri lýsir munin millum fiskimenn undir føroyskum og íslendskum sáttmála, er skipanin við fiskaprísum. Í Íslandi fáa fiskimenn nevniliga í flestu førum ikki marknaðarprís fyri fiskin. Hetta er galdandi, tí virki og skip eru sama fyritøka. Tá hevur reiðarin áhuga í so lágum fiskaprísi sum gjørligt, tí tess minni verður útgoldið sum hýra. Tískil ásetur reiðarin meira og minni sjálvur prísin til fiskimannin. Í hesum førinum liggur toskaprísurin millum 13 og 14 kr. pr. kg, meðan marknaðarprísurin er omanfyri 20 kr fyri tann størsta toskin. Her er talan um munir, sum hava stóra ávirkan á inntøkur fiskimanna.

Íslendska Sjómannasambandið hevur verið í fleiri verkføllum, sum hava vart mánaðir tilsamans, fyri at tryggja fiskimonnum marknaðarprís, men her síggja vit, hvussu lítið er komið burtur úr.

Hinvegin hevur Føroya Fiskimannafelag uttan nakran háva tryggjað føroyskum fiskimonnum, at teir altíð kunnu fáa rætta prísin fyri fiskin. Hetta er sjálvsagt ein felags áhugi, fiskimenn hava við reiðarar, sum eru óheftir av virkjum. Men verða skip og virki samanløgd, sum gongdin er nú, kunnu fiskimenn altíð krevja sín part fråbýttan, og teir kunnu selja hann til hægstbjóðandi, um teir ikki verða avroknaðir av marknaðarprísinum. Henda reglan er nóg mikið til at tryggja fiskimonnum marknaðarprís, tí reiðarí við virki vil einki fáa burturúr at trýsta prísin.

Nakað tað sama er galdandi fyri aðrar veiðihættir, sum t.d. ísfiskatrolarum at føroyskir fiskimenn eru betri fyri enn teir íslendsku.

Tað eru viðurskifti, sum kunnu broyta júst hesi tølini nakað, sum t.d. pensjónsgjøld hjá báðum pørtum, og at toskaprísurin beint er farin upp við 10%. Men hetta broytir ikki hesa niðurstøðu.

Undir øllum umstøðum kann staðfestast, at tað er eydnast Føroya Fiskimannafelag at tryggja føroyskum fskimonnum munandi betri sáttmála og trygd við fiskaprísum enn tað, sum er galdandi fyri flestu fiskimenn í Íslandi.

Heilt eiðasørt hevur Fiskimannafelagið kanska ikki verið!

# Bók um adressumálið í 1917

**Forlagið Fróðskapur hevur givið út bókina "Adressumálið – Donsk-føroysk viðurskifti undir fyrra heimsbardaga", sum Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, hevur skrivað**




BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Í bókini viðger rithøvundurin Adressumálið, sum tók seg upp í Føroyum í 1917 orsakað av teimum truplu flutningsviðurskiftunum undir krígnum í Norðuratlantshavi. Hetta málið, sum hevði við sær, at viðurskiftini millum danskar myndugleikar og føroysku sjálvstýrisrørsluna gjørdust spent, íbirtist, tá ið nakrir sjálvstýrismenn vegna Føroya fólk ætlaðu at venda sær til bretskar myndugleikar fyri at fáa hjálp viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya. Í bókini verður víst á, hvussu hetta málið gjørdist partur av donskum politikki eftir kríggið, tá ið ein donsk kanningarnevnd varð sett at gera umfatandi rannsóknir í málinum.

Niðurstøðan í bókini er, at ætlanirnar hjá onkrum av adressumonnunum møguliga lógu á markinum til tað, sum danski uttanríkisráðharrin nevndi „svigtende statsfølelse", men at málið, tá samanum kom, hevði so lítið at týða, at tað ikki stóð í rímiligum lutfalli til tað drúgva kanningararbeiðið, sum var liðugt í 1919, og ákærurnar hjá nevndini um „rigsskadelig Adfærd".

Adressumálið er dømi um, at føroysk viðurskifti kunnu verða drigin upp í danskan politikk á óhepnan hátt fyri ríkisfelagsskapin.

Hans Andrias Sølvará er cand.mag. í søgu og heimspeki frá Århus Universitet. Hann hevur síðani 1996 verið lærari á Eysturoyar Studentaskúla og HF-skeiði og síðani 2000 á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hann hevur eisini undirvíst á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum. Frá 1. august 2007 fer hann undir at skriva Klaksvíkar søgu fyri Klaksvíkar Kommunu.

Hans Andrias Sølvará skrivaði bind 1 og eina grein í bind 2 í røðini Løgtingið 150, sum kom út í 2002, og hevur eisini skrivað fleiri greinar og hildið fyrilestrar, m.a. um evnir úr politisku søgu Føroya.

Seinastu mánaðirnar hevur hann skrivað eina røð av greinum um Bíbliuna og kristindóm úr einum søgufrøðiligum sjónarhorni.

Bókin um Adressumálið er 172 síður, heft við klaffum og kostar 200 kr. Hon fæst til keyps í bókhandlunum kring landið.

Brot úr bókini:

"Hendingarnar í 1917 og 1918, sum landafrøðiliga skarvaðu stór øki av danska ríkinum, vóru týðandi fortreytir fyri, at ein meiriluti í Landstinginum yvirhøvur kundi brúka føroyska adressumálið innanríkispolitiskt. Ákærurnar um "rigsskadelig Adfærd", sum kanningarnevndin setti fram móti Jóannesi Paturssyni í 1919 - og harvið eisini óbeinleiðis móti stjórnini hjá C. Th. Zahle - eiga at verða settar í samband við hesarríkispolitiskuhendingarnar. Hóast støða Føroya í danska ríkinum ikki var tann sama, sum støðan hjá Íslandi og Vesturindisku oyggjunum, so var veruligur vandi fyri, at upploysingargongdin í danska ríkinum fór at breiða seg til Føroya - ein part av danska Grundlógarøkinum - tá ið hesi økini gjørdust sjálvstøðug."